ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 8. juli 2009

# Mouritsen vil víðari

**- Nú fari eg at royna eina nýggja avbjóðing, sum vónandi verður við til at menna meg, sigur Christian R. Mouritsen, sum í fyrrakvøldið skifti úr HB til B36**



uni@sosialurin.fo
Uni Holm Johannesen

Christian R. Mouritsen spælur við B36 komandi tríggjar mánaðirnar. Tað varð mánakvøldið, tá miðvallarin og Kristian á Neystabø, formaður í FC Tórshavn, høvdu skrivað sítt navn á sáttmálingarskjalið. Avtalan er í fyrsta umfari galdandi fyri árið út.

### Lítla spælitíð

Christian R. Mouritsen hevur leingi verið mettur sum av evnaríkastu føroysku fótbóltsleikarunum. Í fleiri ár var hann knýttur at ungdómsdeildini hjá Manchester City, men skaðar hava darvað honum nógv. Eisini seinasta árið, har hann hevur umboðað barndómsfelagið HB.

Men nú ætlar miðvallarin at prógva sítt virði.

- Eg havi ikki fingið serliga nógvar minuttir á vøllinum fyri HB í ár. Nú fari eg at royna eina nýggja avbjóðing, sum vónandi verður við til at menna meg. Dreymurin er framvegis at sleppa uttanlands, og kanska er skiftið ein loypifjøl.

Men hví valdi tú ikki at stríðast fyri tínum plássi í HB?

- Tað eru ymisk viðurskifti í HB, sum eisinans er millum meg og leiðsluna. Og eg kann ikki gera viðmerkingar til júst hatta, sigur Christian R. Mouritsen, sum staðfestir, at hann eisini hevði onnur tilboð.

### Hugsar ikki um tað

Kári Reynheim, Julian Johnsson, Jákup á Borg, Bárður Mortansson og Tróndur Vatnhamar. Allir hesir hava roynt af skift úr eina høvuðsstaðarfelagnum í hitt. Nú ger Christian R. Mouritsen teimum kynstrið eftir, men tað er ikki reiðuliga nakað, sum miðvallarin hugsar um.

- Tað kann eg ikki siga. Eg havi fyrst og fremst hugsa um, hvussu eg kann sleppa víðari. Og eg geri tað, sum er best fyri meg. Eg eri í øllum førum til reiðar til avbjóðinga, sigur Christian R. Mouritsen.



**Christian Restorff Mouritsen hevur als ikki slept dreyminum um eina yrkisleið uttan fyri føroysku landoddarnar. Men fyrst og fremst ræður um at fáa spælitíð, sigur hann**

## Toppskjútti heim til AB

Nógv bendir á, at Tróndur Sigurðsson nýtir summarsteðgin til at skifta frá HB til AB.

Tróndur var í fjør toppskjútti hjá AB, tá liðið flutti upp aftur í fremstu fótbóltsrøðina, men eftir at hann í vetur skifti til barndómsfelagið, HB, hevur hann havt ilt við at spæla seg til fast pláss.

- Vit eru í samráðingum við HB og spælaran sjálvan, men enn fái eg ikki staðfest, at spælarin kemur til okkara. Undir øllum umstøðum vilja vit styrkja um álopspartin hjá okkum, og hetta er so ein av møguleikunum, sum vit arbeiða við, sigur Sjúrður Olsen, næstformaður í FC Argir.

*-mørk*



## Framtíðin er óviss

- Eg spæli neyvan aftur í ár.

*René Tórgarð hevur ikki vart málið hjá EB/Streymi seinastu mánaðirnar. Orsøkin er ein álvarsamur skaði í knænum.*

*- Eg skal til kanningar í dag, og vónandi fái eg staðfest, hvat bagir. Eg kann í løtuni ikki siga, nær eg spæli aftur, sigur René Tórgarð.*

*Málverjin hevur ikki verið á vøllin síðan 19. apríl í ár, tá EB/Streymur vann 3-0 á heimavø*